WWW.SMYRIL-LINE.COM

DUGNALIG STARVSFÓLK

TIL TÍTT VIRKI ELLA TÍN STOVN

Vegna bygnaðarbroytingar noyddist SMYRIL LINE herfyri at siga nøkrum av okkara starvfólkum upp. SMYRIL LINE harmast um at hendan avgerð varð neyðug, tí tað snýr seg um dugnalig og nærløgd starvsfólk.

Fyrrverandi starvsfelagar okkara hava nógv at bjóða einum komandi arbeiðsgevara. SMYRIL LINE vil tessvegna mæla virkjum og stovnum, ið søkja ella umhugsa at søkja nýggj starvsfólk, at venda sær til okkum fyri at vita, um vit hava rætta persónin til starvið.

Starvsfólkini, ið talan er um, hava royndir og útbúgving innan hesi øki:

- Sølu og kundatænastu
- Bókhald
- Call Center og telefonráðgeving
- Prosjektleiðslu
- Marknaðarføring
- Fyrisiting og skrivstovuarbeiði

Meiri fæst at vita við at venda sær til Hendrik Egholm, sølu og marknaðarstjóra, á tlf. 34 59 39

J. Broncks gøta 37 · Postboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf 34 59 00
Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo

SMYRIL LINE

# Um 300 írar fáa ikki lent

**í løtuni eru fýra flogfør, sum bíða eftir líkindum at lenda í Vágunum. Trý teirra eru full av írum, sum ætla sær til dyst. Men einki røkist fyri nøkrum glotta, og lenda tey ikki skjótt, verða írsku áskoðararnir allarhelst ov seinir til dystin**

FLOGFERÐSLA
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*



*Tað fer allarhelst at merkjast á Tórsvølli, um umleið 300 írar, ið hava atgongumerki ikki koma hóast alt. Trý flogfør við írskum áskoðarum flúgva nevniliga uppiyvir, men fáa ikki lent fyri nógva mjørkanum*

– Eitt flogfar frá Belgia hevur verið her í morgun, og hevur roynt at lent. Tað flogfarið er fult av írum, sum skulu til fótbóltsdyst. Atlantic Airways hevur somuleiðis tvey leiguflogfør, sum heldur ikki fáa lent. Harumframt er eitt vanligt rutuflogfar hjá Atlantic Airways, sum eisini skuldi verið lent í morgun, greiðir Hanna hjá Atlantic Airways frá.

Hon sigur, at flogførini í løtuni pendla ímillum Norra og Vágar, og bíða eftir einum glotta í tunga mjørkanum. Men tað røkist einki fyri nøkrum lendingarlíkindum.

– Vit vita, at írarnir nú vilja hava at vita, hvørt tað fer at bera til at lenda ella ikki. Og um teir ikki lenda innan stutta tíð, so verða teir ov seinir til dystin. Eg veit ikki nær teir gevast at royna, men eg vænti ikki, at tað verður so ógvuliga leingi afturat, sigur Hanna.

Spurd, um tey, ið ikki fáa lent, fáa peningin aftur, svarar Hanna, at tað veldst um hvørja trygging teir hava.

– Eru teir væl tryggjaðir, so skuldi tað ikki verið nakar trupulleiki. Men eru teir ikki tað, so fáa teir neyvan nakað aftur, sigur hon.

Um líkindini ikki batna so flogførini fáa lent, fær Atlantic eisini aðrar trupulleikar at dragast við, tí so sleppa hvørki írska landsliðið ella teir áskoðararnir, sum eru komnir til landið, heimaftur.

– Í løtuni er einki flogfar í Føroyum, øll flúgva uppiyvir og royna at lenda. Men fáa tey ikki lent, so sigur tað seg sjálvt, at eingin sleppur avstað aftur, staðfestir Hanna.

Tá blaðið fór til prentingar, var enn ikki staðfest, nær flogførini gevast at royna ella ikki.



COROLLA 25

TOYOTA

Corolla 25 diesel

Til at hátíðarhalda tey 25 árini, Reyni Service hevur umboða Toyota í Føroyum, bjóðar Reyni Service eitt serstakt føðingardagssnið av Toyota Corolla diesel. Sniðið hevur heitið Corolla 25 diesel og sjáldsama væl upplagdi motorurin, stendur einki aftan fyri bensin útgávunar. Haraftrat megnar hann samfullar 17,2 km/l við býarkoyring!

Tilboðið er galdandi so leingi Corolla 25 diesel er á goymslu.

Toyota Corolla 25 fæst fyri **kr. 210.000,-**

**Corolla 25 diesel er útgjørdur við hesi eykaútgerð:** Gáttir á síðunum og pyntilistar aftan, tokulyktir, aircondition, alu-felgur, leðurróður við fjarstýring til radio, gearknøtt úr leðri við chromi og "Luna"-inntrekk.

Corolla 25 diesel kostar kr. 222.000,-, um bilur er í býti.

TEAM85

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F